

# Aðalstjóri til Heilsumálaráðið

Søkt verður eftir einum dugnaligum og framskygdum aðalstjóra til Heilsumálaráðið.

## STARVIÐ SUM AÐALSTJÓRI

Aðalstjórin er ovasti ráðgevi hjá landsstýrisfólkinum og hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum í Heilsumálaráðnum. Aðalstjórin er ovasti stjóri fyri Heilsumálaráðið.

Aðalstjórin ráðgevur í fakligum spurningum og politiskum viðurskiftum í sambandi við, at mál hjá landsstýrinum skulu fremjast. Aðalstjórin skal tryggja landsstýrisfólkinum dygdargóða tænastu í øllum tiltøkum og spurningum, sum landsstýrisfólkið fær. Tað er somuleiðis ábyrgdin hjá aðalstjóranum at tryggja, at avgerðir eru lógligar og rættar.

Aðalstjórin skal hava gott innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru avgerandi í einari politiskari fyrisiting.

Við støði í leiklutinum er týdningarmikið, at landstýrisfólkið og aðalstjórin hava fult álit sínámillum. Tey eiga at hava eina felags fatan av leiðslurúminum hvør hjá øðrum soleiðis, at tey altíð vita hvør av øðrum í gerandisdegnum.

## FAKTABOKS

Stovnar og fyriskipanir undir Heilsumálaráðnum eru:

- Heilsustýrið
- Sjúkrahúsverkið
- Heilsutrygd
- Apoteksverkið
- Hvíldarheimið Naina
- Viðgerðarstovnar móti rúsevnismissnýtslu

## HØVUÐSUPPGÁVUR

Aðalstjórin skal leiða og samskipa arbeiðið í Heilsumálaráðnum. Høvuðsuppgávurnar eru at:

- Samskipa og fyrireika uppgávur innan málsøkini hjá Heilsumálaráðnum.
- Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið.
- Leiða arbeiðið í Heilsumálaráðnum og tryggja, at stjórnarráðið virkar í samsvari við politisk mál.
- Hava eftirlit við stovnum undir Heilsumálaráðnum.

## FØRLEIKAKRØV OG VÆNTANIR

Starvið krevur útbúgving frá hægri lærustovni á hædd við kandidat-/masterprógv umframt týðandi og viðkomandi leiðsluroyndir frá tí almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum.

Væntað verður, at umsøkjarin megnar at arbeiða undir trýsti, hevur ein mennandi leiðslustíl og er slóðbrótandi í strategiskum arbeiði.

Tað er av týdningi, at umsøkjarin megnar at seta greið mál, skapa úrslit og dugir at raðfesta og deila út uppgávur. Umsøkjarin má hava góðar samskiftisførleikar bæði munnliga og skrivliga.

## VILT TÚ HOYRA MEIRA?

Hevur tú spurningar ella hug at hoyra meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, løgmansstjóra, á tel. 55 50 16.

## SETANARVIÐURSKIFTI

Aðalstjórastarvið er flokkað í 39. lønarflokki sambært sáttmála millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið, tó uttan at vera eitt tænastumannastarv. Starvið er áramálssett í 7 ár við møguleika fyri leingjan í upp til 3 ár.

Umframt eina mánaðarliga viðbót á 6.380 kr. fyri aðalstjóraleiklutin verður veitt ein mánaðarlig viðbót á 20% av grundlønini fyri áramálssetan. Eftirlønin er 15% av samlaðu lønini.

Setanarøkið fevnir um Heilsumálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Heilsumálaráðið.

## SØK STARVIÐ HER

Um hetta ljóðar sum eitt starv fyri teg, kanst tú senda eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møguligum viðmælum til starv@tinganes.fo.

Freistin er **sunnudagin 6. oktober 2024.**

*Starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health